# Viðtøkur fyri Ramsar nevndina fyri Mykines

**Endamálið við Ramsar nevndini er at arbeiða fyri, at náttúruvirði í Mykinesi, serliga fuglur og vistskipanir teirra, verða varðveitt eftir regluni um burðardygga nýtslu. Fuglateljingar eru týðandi partur av arbeiðinum.**

Nevndin virkar fyrst og fremst fyri, at tilmælini í verandi Ramsar ætlan fyri Mykines verða fylgd, men kann eisini taka upp onnur evni, sum viðkoma verju av fugli og náttúru í oynni ella eru fevna av Ramsar-sáttmálanum[1] sum heild. Eisini kann nevndin taka stig til at dagføra ætlanina.

Nevndin arbeiðir í samstarvi við allar áhugapartar, við serligum denti á kommunu, borgarar, felagsskapir o.o. í Mykinesi.

Nevndin er mannað við myndugleikum og øðrum, sum umboða áhugamál, sum fremja arbeiðið hjá nevndini. Ramsar nevndin í Mykines hevur hesar føstu limir:

- Sørvágs kommuna
- Ramsar-umboð fyri Sørvágs kommunu
- Umboð fyri hagastýrini í Mykines
- Visit Vágar
- Umhvørvisstovan
- Náttúrugripasavnið (Tjóðsavn Landsins)

Aðrir áhugapartar verða bodnir á fund eftir tørvi. Nevndin skipar fyri almennum fundum tá tørvur er á tí.

## Mannagongdir

- Nevndin hevur fund eftir tørvi, men í minsta lagi eina ferð um árið.
- Á leið eina viku áðrenn hvønn fund sendir skrivarin limunum uppskot til fundarskrá og í seinasta lagi 3 dagar áðrenn fundin fáa limir fundarskjøl.
- Uppskot til fundarfrásøgn verður send limunum 1-2 vikur eftir fundin.
- Mentamálaráðið fylgja arbeiðinum, og fær avrit av fundarfrásøgnum.
- Nevndarlimir, sum ikki eru í almennum starvi, fáa fundarsamsýning og endurgoldið ferðaútreiðslur sambært almennum reglum.

Hetta skjalið er ein dagføring av upprunaligu viðtøkunum, sum vórðu samtykt á fundi í Ramsar nevndini fyri Mykines tann 08.06.15. Samtykt á nevndarfundi 14.09.18.

[1] www.ramsar.org